**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**

*HEIMARØKTIN*

# Ítrivsvegleiðari

## til Eldrasambýlið í Vestmanna

Eitt starv sum ítrivsvegleiðari á setanarbrøki 0,5 í tíðarskeiðnum 1. september 2006 til 31. desember 2006 er leyst at søkja.

Arbeiðstíðin er dagtímar mánadag til fríggjadag.

**Førleikakrøv:**

- Útbúgving sum ítrivsvegleiðari, ergoterapeautur ella heilsurøktari.
- Hevur hug og hegni at starvast við eldri fólki og at samstarva við ymiskar fakbólkar
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og tilrættaleggja dagin í mun til tørvin hjá tí einstaka brúkaranum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fæst við at venda sær til økisleiðaran á telefon 333249 og 282249.
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. verður at senda til:

**Heimarøktin Vágar/Norðstreym**
Økisskrivstovan
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 4. august 2006**

---

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
**800 Tvøroyri**

# Sjúkrahjálparar/ Heilsuatstøðingar

Eitt starv sum sjúkrahjálpari/heilsuatstøðingur við eini arbeiðstíð uppá 0,7 í skiftandi vaktum er leyst til setan frá 1. september 2006.

Eitt starv sum sjúkrahjálpari/heilsuatstøðingur við eini arbeiðstíð uppá 0,7 í skiftandi vaktum í tíðarskeiðinum frá 1.september 2006 – 1.september 2008.

Eitt starv sum sjúkrahjálpari/heilsuatstøðingur við eini arbeiðstíð uppá 0,7 í skiftandi vaktum í tíðarskeiðinum 1. september 2006 – 1. apríl 2007.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Almanna- og Heilsurøktarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna Sunnevu Petersen tlf. 37 16 66 lokal 147.

Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulus sendast til:

**Suðuroyar Sjúkrahús**
Att: Umsjónarmannin
800 Tvøroyri

**Umsóknarfreist 7. august 2006.**

---

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
**800 Tvøroyri**

# Sjúkrarøktar-frøðingar

Vegna farloyvi verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingi, við eini arbeiðstíð uppá 0,7 í skiftandi vaktum í tíðarskeiðinum 1. september 2006 til 1. apríl 2007.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna Sunnevu Petersen, tlf. 371666 lokal 147.

Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

**Suðuroyar Sjúkrahús**
Att: Umsjónarmannin
800 Tvøroyri

**Umsóknarfreist 7. august 2006.**

---

**Viðareiðis skúli**
FO-750 Viðareiði
Tlf. 588052 · Teldupostur: vid@skulin.fo

# Lærarastarv í Viðareiðis Skúla

**Skúlaárið 2006/2007 er eitt tíðaravmarkað starv vegna avlopstímar leyst at søkja.**

Undirvísingartímatalið er umleið 16 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður fastsett í september.

**Søkt verður eftir lærara, sum:**

- undir ábyrgd leiðslunnar skal taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- er við í arbeiðinum áhaldandi at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærara, ið kann átaka sær at undirvísa í :**

- føroyskum í 2. og 3. flokki
- ítrótti í 1. og 2. flokki
- næmingi við serligum tørvi

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi **í seinasta lagi fríggjadagin 4. august kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jensebeth Absalonsen, skúlaleiðara á tlf. 58 80 52.

---


# BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



**Ring og hoyr nærri**

· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

miðlahúsið
í Vágsbotni

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO
Sosialurin